# Orkufundur á Oyrarbakka

**Orka og umhvørvi verða evnini á fundi, sum verður á Oyrarbakka mikukvøldið**

ORKA
*Tíðindaskriv*

Áhugaverdur fundur um orku og ymiskt í hesum sambandi verður á Oyrarbakka mikudagin 16. juli klokkan 19. Fundurin verður í Skálanum í Norðskála-Oyrar skúla.

Á fundinum verður ljóskastarin settur á sera aktuella evnið orka. Tey, ið koma at hava innlegg á fundinum, hava øll áhuga í orku í breiðastu merking. Av tí at fyrilestrarhaldararnir hava ymisk sjónarhorn til orku og tey árin, sum tiltøkini fyri at útvega orku hava havt og framhaldandi fara at hava á náttúruna, fáa áhoyrararnir lýst hetta áhugaverda evni ógvuliga broytt.

Tey, ið koma at greiða frá, eru Anni á Hædd um nýggja umhvørvisverndarlógina, Hákun Djurhuus um vatnorkuútbyggingina hjá S.E.V., Anna Maria Fossá greiðir frá um umhvørviskanningar av Eiði 1, 2 og 3., eins og at Kári Thomsen fer at greiða frá arbeiðnum hjá F.N.U. í sambandi við vatnorkuútbyggingar.

Jóhan Í Niðristovu fer at greiða frá pumpukraftverkætlan og at enda kemur eitt umboð fyri Lokal Agenda 21 at greiða frá teirra arbeiði.

# 133.721 krónur uttan eigara

*Enn hevur eigarin av teimum 133.721 krónunum ikki gjørt vart við seg. Seðilin, sum hevur vunnið, varð keyptur í Kiosk Activ í viku 18*




**Ein lottoseðil, seldur í Kiosk Activ í viku 18, hevur vunnið 133.721 krónur. Men enn hevur eigarin ikki gjørt vart við seg**

LOTTO
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Nógvir eru lottoseðlarnir, sum verða slongdir um handilsdiskarnar um dagarnar, tá fólk í vónini um tann heilt stóra vinningin taka ein seðil afturat tí, sum annars er keypt.

Tað kemur tó fyri, at fólk ikki gáa eftir, um tey hava vunnið ella ikki. Á heimasíðuni hjá Danske Spil, www.danskespil.dk, verður nú sagt, at 13 seðlar, sum hvør hava vunnið oman fyri 100.000 krónur, enn ikki eru innloystir.

Ein av hesum varð í viku 18 keyptur í Kiosk Activ í Havn. Um tað er vónbrotið um, at talan ikki var um tann heilt stóra vinningin, ella at eigarin bara ikki hevur gáað eftir hesum, er ikki vist, men enn hevur eigarin av seðlinum ikki gjørt vart við seg.

Freistin at boða frá vinningum, sum eru oman fyri 200 krónur, er eitt ár, so eigarin av seðlinum hevur framvegis fram til viku 18 í 2009 at gera vart við seg.

Og gjørdist talan ikki um hesar 133.721 krónurnar, so ber sjálvandi til hjá vónríkum lotto-spælarum at royna eydnuna aftur hetta vikuskiftið. Hesa ferð er vinnarapuljan um tær 10 milliónirnar, umframt at jokarin er 5 milliónir, og tað er jú eisini eitt slag av pengum.


## Stýring frá a til ø

### – verkætlanarleiðari til menningardeildina

**Menningardeildin í Føroya Banka hevur ábyrgd av at samskipa og stýra øllum verkætlanum bankans og arbeiðir eftir einum skipaðum leisti í tøttum samstarvi við virkisøkini og leiðsluna. Vit víðka nú hóp okkara av dugnaligum verkætlanarleiðarum, og kanska er tað júst tær, vit leita eftir.**

**Starvið**
Sum verkætlanarleiðari í bankanum fært tú ábyrgd av verkætlanum og uppgávum frá a til ø, eins og vit vænta eina handilsliga tilgongd og tætt samstarv í toyminum við denti á úrslit.

**Tú**
Tú hevur viðkomandi hægri útbúgving og royndir sum verkætlanarleiðari. Persónligu eginleikar tínir eru m.a. opinleiki, framsøkni, málsøkni, góð samskiftisevni og sjálvstøðugt arbeiðslag, eins og tú megnar at hava greiði á fleiri uppgávum í senn.

**Menningarmøguleikar**
Góðir møguleikar eru fyri víðari førleikamenning, bæði fakliga og persónliga.

**Meira at vita**
Vilt tú vita meira um starvið, ert tú vælkomin at venda tær til Inga Vestergaard, menningarleiðara, á tel 330 330 ella á iv@foroya.fo.

Skrivlig umsókn saman við avritum av CV og prógvum skal sendast til starvsfolk@foroya.fo ella til P/F Føroya Banki, Att: Bjarki Mohr, Húsagøta 3, FO-100 Tórshavn og skal vera okkum í hendi **í seinasta lagi 21. juli.**

Ø

SENDISTOVAN

FØROYABANKI